# Runavíkingar ætla sær greipuna

**Lagt er upp til ein sera spennandi dyst í Gundadali í kvøld, tá ið HB og NSÍ hittast í seinasta dystinum í fyrru helvt av landskappingini í ár. Vinnandi liðið fer í summarfrí á oddasessinum í 1. deild**

HB-NSÍ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Einki er at ivast í, at dysturin í kvøld fer at savna nógvar áskoðarar. Runavíkingar møta vanliga mans-sterkir til dystirnar hjá NSÍ, og tá ið talan er um ein slíkan dyst, har NSÍ við einum sigri kann leggja seg á odda í 1. deild, verða guliganz óivað fleiri í tali, enn teir vanligt eru. Harafturat eru nógvir útisetar í løtuni heima í summafrí, og tað sæst vanligani aftur á áskoðarafjøldini í Gundadali.




*Tað varður týdningarmikið hjá NSÍ at steðga Rógva Jacobsen, um teir ætla sær at basa HB í Gundadali í kvøld*

*Savnsmynd*

### Venjarin ivasamur

Leikandi venjarin hjá HB, Heine Fernandez, sigur, at teir eru øgiliga spentir og tendraðir til dystin í kvøld. Liðið vandi hart mánakvøldið, og í gjárkvøldið var ein løtt venjing á skránni. Sjálvur hevur Heine Fernandez ikki vant í seinastuni. Hann hevur júst verið og vitjað familjuna í Danmark í eina viku, og harafturat hevur hann trupulleikar við rygginum og lærinum. Heine sigur, at enn er ivasamt, um hann verður við í dystinum í kvøld, men hann vónar, at vøddamýkjarin hjá HB fær gandað eitt sindur, so at hann kann spæla við í oddabrakinum. Tó er greitt, at teir tríggir Hans á Lag, Bárður Johannesen og Martin Christensen fram-vegis ikki eru tøkir hjá havnarfelagnum.

Í seinasta landskappingar-dystinum hjá HB var ein nýggjur maður millum stengurnar. Talan var um Danny Rasmussen, og Heine Fernandez sigur, at Danny verður aftur millum stengurnar í kvøld. - Danny fekk møguleikan í Gøtu, og ikki kann sigast annað, enn at hann tók av møguleikanum, tá ið hann fekk hann, sigur Heine Fernandez.

Tað er einki dulsmál, at hendan vikan er ein sera umráðandi vika hjá havnarfelagnum. Vinna teir dystin í kvøld, eru teir trý stig á odda í summarsteðginum, og sunnudagin skulu teir leika seinnu hálvfinaluna í Løgmanssteypinum ímóti VB í Havn. Leikandi venjarin hjá HB sigur, at vinna teir báðar dystirnar hesa vikuna, sær tað heilt gott út. Hann leggur afturat, at tað er einki dulsmál, at tað er júst slíkar dystir, ið spælararnir síggja fram til eitt heilt kappingarár.

### Skulu bróta ísin í ár

Í Runavík er spenningurin, eins og í Havn, sera stórur undan dystinum í kvøld. Liðskiparin hjá NSÍ, Jens Martin Knudsen, sigur, at allir mans hjá runavíkingum eru klárir til oddabrakið. Royndi málverjin hjá runavíkingum sigur, at nú er NSÍ við aftur í rætta endanum, eftir at teir hevdu eina ivasama byrjan upp á kappingarárið, og runavíkingar ætla sær at verða verandi í oddinum.

Jens Martin sigur, at málið hjá NSÍ í ár er at vinna greipuna. - Vit trúgva uppá, at tað í ár fer at eydnast hjá okkum at bróta ísin í landskappingini, soleiðis at vit kunnu gerast føroyameistarar, sigur landsliðsmálverjin. NSÍ er kanska tað felagið í landinum, sum hevur havt tað mest støðuga fólkið seinnu árini, og tað er óivað ein fyrimunur, at menn kenna so væl hvønnannan. Harafturat heldur Jens Martin, at framtíðin hjá NSÍ sær ógvuliga ljós út, tí heilt nógvir ungir og evnaríkir leikarar eru á veg upp í vaksnamannadeildirnar, og tað fer at økja kappingina á besta liðnum hjá NSÍ, og tað ger bara liðið betur, heldur Jens Martin Knudsen.

### Væntar undirhaldandi dyst

Um sjálvan dystin í kvøld, sigur liðskiparin hjá NSÍ, at hann væntar ein sera spennandi og undirhaldandi dyst. Landsliðsmálverjin sigur, at bæði HB og NSÍ óivað fara eftir báðum stigunum, og tí fara bæði liðini at leypa á, sigur Jens Martin Knudsen.

Nógvu royndirnar hjá landsliðsmálverjanum siga, at dystirnir millum HB og NSÍ ofta eru rættuliga væl leiktir dystir, og hann væntar ikki, at dysturin í kvøld verður nakað undantak í so máta. Tað er heldur ikki so, at annað lið hevur gott tak á hinum liðnum í Gundadali, tí NSÍ hevur mangan givið HB skarpan gang í Gundadali, men samanlagt sæð tala tølini til fyrimuns fyri havnarfelagið.

Dysturin í kvøld skuldi upprunaliga verið leiktur klokkan seks, so at tað ikki rann saman við fyrru hálvfinaluna í EM-endaspælinum, men eftir ynski frá runavíkingum er dysturin fluttur til klokkan sjey.

### Góð odds upp á NSÍ

Stóra veddingarheimasíðan, www.nordicbet.com, hevur sett odds upp á dystin í kvøld, og tey eru rættuliga áhugaverd. Millum annað gevur ein sigur til runavíkingar odds 5,55, og tað er ikki so lítið. Ein javnleikur gevur pengarnar aftur 3,30 ferðir, meðan veddingarfyritøkan hevur HB sum stórfavorittar, tí ein heimasigur gevur bert pengarnar aftur 1,50 ferðir.



*Liðskiparin hjá NSÍ, Jens Martin Knudsen, er bersøgin og sigur greitt, at málið hjá NSÍ í ár er at vinna greipuna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Heri og John á odda

**Heri Simonsen og John Petersen hava lagt seg á ovastu sessirnar eftir 24 av teimum 31 EM-dystunum eru leiktir**

EM-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*



*John Petersen og Heri Simonsen eru teir báðir veddararnir, sum hava staðið seg best higartil í stóru EM-kappingini*



Símun Midjord megnaði ikki at halda fast um oddasessin, sum hann hevði vunnið sær eftir fyrsta umfarið í stóru EM-kappingina.

Eftir fyrstu 12 dystirnar hevði Símun níggju rætt, men í næsta umfarinum var hetta tal lækkað niður í seks, so samlaða úrtøkan hjá honum er 15 dystir.

Hetta hevur givið Hera Simonsen og John Petersen rúm í kappingini, og teir eru nú báðir farnir framvið Símuni. Bæði Heri og John høvdu eftir fyrsta umfarið átta rætt, og hetta úrslitið endurtøku teir næstu 12 dystirnar, soleiðis at teir nú hava 16 rættar dystir hvør. Eitt imponerandi miðal upp á 66,7%.

Talan er tó framvegis um eina harða kapping í dystinum um at vinna stóra vinningin, sum er ein fótbóltsferð í Europa eftir egnum ynski. Men oddurin er nú um at gerast smalur.

Niðanfyri prenta vit tó yvirlit yvir teir tíggju veddararnar, sum hava staðið seg best higartil.

**Toppurin**

| | |
|---|---|
| Heri Simonsen | 16 |
| John Petersen | 16 |
| Símun Midjord | 15 |
| Dánjal Joensen | 15 |
| Jákup E. Jacobsen | 15 |
| Osvald Hansen | 14 |
| Rúnar Jacobsen | 14 |
| Jákup Bogi Joensen | 14 |
| Bergur Midjord | 14 |
| Jens Pauli av Reyni | 14 |

W W W . S O S I A L U R I N . F O



## EM-KAPPINGIN

| 4. UMFAR | | | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|---|---|
| Portugal - Holland | Hálvfinala: | 30. juni kl. 19.45 | | | |
| Kekkia - Grikkaland | Hálvfinala: | 1. juli kl. 19.45 | | | |

At senda til: EM-spælið, postsmoga 3341, FO-110 Tórshavn
Seðilin kann eisini latast inn hjá Kiosk Steinatún í Havn.
Seðilin skal vera sendur/latin inn í seinasta lagi mikudagin, 30. juni.

Fornavn ____________________
Eftirnavn ____________________
Føðingardagur ____________________
Lið nr: ____________________
Bústaður ____________________
Postnr. og staður ____________________

Sosialurin
Kiosk Steinatún


## HB vildi leiga Jákup Mikkelsen

HB hevur spurt seg fyri hjá KÍ um at leiga landsliðsmálverjan Jákup Mikkelsen til Europa Cup dystirnar hjá felagnum.

Hetta váttar málverjin fyri Norðlýsinum

– Tað vóru ov nógv ógreið viðurskifti, og tí bleiv ongantíð meiri burtur úr hesum, sigur Jákup Mikkelsen við Norðlýsið.

## Tannáringar standa seg væl

Í Wimbledon tenniskappingini, sum verður hildin í hesum døgum, hava fleiri ungir tennisspælarar staðið seg væl. Hjá kvinnunum eru bæði 17 ára gamla Maria Sharapova og 19 ára Karolina Sprem komnar í fjórðingsfinalurnar, og tær hava spælt sera væl higartil. Maria Sharapova, sum er úr Russlandi, sigur, at hennara mál er at koma upp á ovasta pláss á styrkislistanum. Eisini 16 ára gamla Emmanuelle Gagliardi hevur spælt seg í áttandaparts finaluna, og har skal hon dystast við Serenu Williams, sum vann kappingina seinast.

## Tannlæknin dømir finaluna

Ein týskur tannlækni skal døma finaluna í EM-kappingini í Portugal. UEFA hevur nevniliga gjørt av, at Markus Merk fær stóru uppgávuna. Hann er 42 ára gamal tannlækni úr Kaiserslautern og dømi í fjør finaluna í Champions League.

Dómarar til tær báðar hálvfinalurnar verða italski Perluigi Collina og svenski Anders Frisk.

## Ebbe Sand gevst

Álopsspælarin Ebbe Sand gevst nú á danska landsliðnum. Hetta boðaði hann frá eftir tapið ímóti Kekkia sunnukvøldið. Hann spældi 66 landsdystir fyri Danmark og skoraði 22 mál.

– Nú fái eg meira tíð at hvíla meg, og tað verður sjálvandi ein fyrimunur fyri meg í felagnum hjá mær. Eg havi sjálvur gjørt av, at eg vildi gevast á landsliðnum, og nú vóni eg, at eg kann leingja sáttmálan við Schalke, sigur Ebbe Sand.